## DAGSINS MEINING

# Miðlahúsið í Vágsbotni – ein nýggj byrjan

Fríggjadagurin 8. apríl verður ein merkisdagur í 79 ára gomlu søguni hjá Sosialinum. Aftaná nærum 25 ár á Argjum verður flutt heimaftur til Havnar. Frá hesum degi er nýggja adressan hjá blaðnum forkunnuga gøtunavnið Tórsgøta 1, 100 Tórshavn.

Talan verður um rættiliga kollvelting, nú gamli bygningurin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni er umbygdur til blað- og miðlahús. Stóru og snotuligu hølini eru innrættað at hýsa øllum virkseminum hjá blaðnum. Her verður fyrst og fremst talan um at halda fram við og menna framleiðsluna av sjálvari kjarn uvøruni, blaðnum. Umstøðurnar til at gera blaðið verða munandi betri og vónandi fer hetta eisini at síggjast aftur í blaðnum í framtíðini. Haraftrat eru eisini góðar umstøður til at menna útgávuna av øðrum miðlavirksemi so sum internet- og loftmiðlatænastum.

At koma líkst inn í sjálva hjartarótina í høvuðsstaðnum og Føroyum og til eini hús, har arbeiðsumstøðurnar eru sera góðar, skuldi givið starvsfólkinum sera góðar møguleikar at halda fram við sínum arbeiði og vónandi eisini at gera blaðið uppaftur betri. Beligginheitin er í sær sjálvum so mikið góð og sentral, at okkurt skilagott átti at komið burtur úr hesi broyting. At liggja beint upp at bæði løgtingi og landsstýri, býráði og mongum øðrum stovnum og fyritøkum skapar sjálvandi heilt nýggjar og øðrvísi møguleikar, hóast nýggja tøknin hevur gjørt alt landið til eitt nærumhvørvi.

Vit á blaðnum fegnast um hesa nýggju og spennandi avbjóðing og kunnu eisini gleðast um, at vit hava verið so heppin at fáa atgongd til henda byging og hetta søguliga og sentrala stað. Men fyri tað at vit nú gerast ein náttúrligur partur av Havnini, merkir tað ikki, at Sosialurin verður eitt Havnarblað. Betraðu umstøðurnar skulu tvørturímóti geva okkum møguleika at menna virksemi okkara úti kring alt landið. Í hesum sambandi fara vit eisini at menna "rullandi redaktiónina" tvs. at vit ætla og ynskja at vera uppaftur meira sjónlig í gerandisdegnum kring landið alt.

At vit nú fáa meiri pláss og koma at liggja meira sentralt letur so eisini dyrnar upp til annað tilknýtt virksemi. Í hesum sambandi er ætlanin at brúka part av miðlahúsinum til ymiskt virksemi um kvøldarnar og í vikuskiftinum. Her verður m.a. hugsað um mentanarlig tiltøk og kjakfundir av ymsum slag, fyrilestrar og framsýningar, hvørs tiltøk síðani verða endurspeglað á teimum mongu miðlapallunum tvs. í blaðnum, á internetinum og í loftmiðlum. Ein miðvís ætlan við broytingunum er tí konvergensur og synergiir; nevniliga hvussu ymsu miðlapallarnir kunnu samvirka sínamillum og saman við tí virksemi, sum fer at vera í húsunum og kring landið.

Hóast nærum 80 ár gamalt, so meta vit hesa stóru hending, har flutt verður í miðbýin, sum eina nýggja byrjan. Eitt eru føgur orð og stásilig høli. Tey eru sjálvandi ikki nóg mikið í sær sjálvnum. Men týdningarmikið er at hava eina stevnu og ein karm. Tað eru hesi bæði – stevnuna og karmin - vit skulu til at fáa lív í og fylla út.

Sosialurin vónar við hesum at kunnu gerast ein týðandi og positivur partur av øllum virkseminum í høvuðsstaðnum , og at vit kunnu gerast ein góður granni hjá teimum, sum longu húsast har og ikki minst hjá teimum, sum koma í Vágsbotn. Fríggjadagin 15. apríl frá kl. 15 til 17 verður almenna móttøka í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Øll skulu vera so hjartaliga vælkomin til hesa nýggju og spennandi byrjan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú er nóg mikið, Jana H. Dalsgaard !

**Annika B Hoydal**
*Virk. leiðandi ljósmóðir*

**Hugstoytt og skelkandi, at lesa hvussu forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkratøktarfrøðingar vanvirðir og undirmetir fakliga førleikan hjá ljósmøðrunum, og ikki góðtekur heimildir teirra ið eru staðfestar við lóg.**

Sum virkandi leiðandi ljósmóðir, má eg harðliga afturvísa og átala skeivu og hóttandi viðmerking hjá Janu H. Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, í Sosialinum 7. apríl 2005.

**Fakligi førleiki ljósmøðranna**
Eg vil hervið staðfesta, at fakliga útbúgving og førleikin hjá ljósmøðrum gevur teimum fullan førleika at vara av barnakonu og barni hennara, frá graviditeturin verður staðfestur og til barsilstíðin er av. Hetta eru allar barnakonur og børn teirra - frísk sum sjúk.

Hesin førleiki er staðfestur í lóg og tilhoyrandi reglugerðir, og fær ljósmóðirin hendan førðleika við at geva ljósmøðralyfti, og við løggilding (autorisatión).

Hendan løggildingin er givin av danska Sundhedsstyrelsen, ið eisini hevur ábyrgd og myndileika at at tryggja, at ljósmøður til eina og hvørja tíð arbeiða í tráð við førleika teirra.

Tí er tað púra burtur við, at halda uppá at ljósmøður longu hava, og fara at átaka sær uppgávur ið tær ikki eru mentar at røkja. Hetta hevur einki hald í veruleikanum, og prógv fyri hesum er heldur ikki at síggja nakrastaðni í viðmerking Janu H. Dalsgaards.

**Ræðir barnakonur**
Eisini undrar og skelkar tað meg at forkvinnan fyri fakbólki ið hevur góða sjúklingarøkt sum fremsta mál, velur at og ræða barnakonur og familjur teirra við hóttanum um sjúku og eintá deyða, um broytingar verða framdar. Hóttanir ið ikki hava nakað hald í veruleikanum.

At Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar gera hetta til eitt fakpolitisk stríð er greitt, og kanska eisini partvís skilligt, men at nýta hóttanir og sum vápn, og harvið skapa óneyðugan ótryggleika millum barnakonurnar kann als ikki góðtakast og má harðliga mótmælast.

**Virðing fyri øðrum fakbólkum**
Eg skilji sera væl at dugnaligu sjúkrarøktarfrøðingarnir á A2 eru ørkimlaðar og keddar um at fólk skulu sigast úr starvi, men at geva ljósmøðrunum - arbeiðsleysum ella ikki - ábyrgdina fyri hesum er burturvið.

Ljósmøðurnar hava í fleiri ár gjørt vart við at tær hava førleika at starvast á A2. Hetta merkir tó als ikki, at tær hava nakað við hesa rationalisering á Landssjúkrahúsinum - og harvið uppsagnir av starvsfólki - at gera. Tó skal tað vera púra greitt at ljósmøðurnar ynskja at starvast innan alt barnakonuøkið.

Lat tað vera púra greitt at ljósmøðurnar hava fulla virðing fyri arbeiði hjá øllum sjúkrarøktarfrøðingum, og ivast ikki í at eitt gott og virðismikið arbeiði verður gjørt av hesum starvsbólki, men staðfestast má í viðmerking Janu H. Dalsgaard at so er ikki í hennara føri. Umframt at siga, at ljósmøðurnar eru ein hóttan fyri barnakonur og børn teirra, sigur hon at sjúkrarøktarfrøðingar saktans kundu tikið ímóti børnunum, og gerð seg hervið sekan í at siga seg hava førleika ið løggilding hennara á ongan hátt gevur henni heimild til. Hetta er ólógligt og kann sektast við bót.

**Samstarv**
At enda vil eg sum virkandi leiðandi ljósmóðir harmast um henda harðliga og vanvirðiliga atburð hjá fakfelag sjúkrarøktarfrøðingana. Hetta tí eg ikki ivist í, at ljósmøðurnar saman við hinum starvsbólkunum á A2 - og harvið eisini sjúkrarøktarfrøðingar - í felag kundu skapt eina heilt serligt og dygdargott tilboð til allar barnakonur, børn, og familjur teirra. Eitt samlað tilboð, ið gav tað besta frá øllum fakbólkum, soleiðis at besta grundarlag varð lagt fyri allar familjur í Føroyum.

# Viðv.: Friðing av Anton Degn-húsinum, sum undirritaði eigur

**Petur Olsen**

Vísandi til skrivið frá Mentamálaráðnum, dagf. 6. apríl 2005, so hevur Mentamálaráðið tikið avgerð um, at tilmælið hjá Fornminnisnevndini um at friða Degnshús og tilhoyrandi matrikul, fyri at tryggja varðveitsluna av bygninginum, ikki verður gingin á møti.

Undirritaði hevur tó merkt sær tær nógvu undirskriftirnar, sum samlaðar vórðu inn til tess at fáa húsini varðveitt, samstundis staðfest, at bæði borgarstjórin og varaborgarstjórin, umframt meginparturin av býráðssamgonguni, sum nú situr, alment vóru frammi og boðaðu frá, at hesi ynsktu húsini varðveitt í tí líki, tey nú standa í.

Hetta sampakkar illa við tær ítøkiligu byggiætlanir, sum undirritaði hevur havt, og sum heild er fyri, samt galdandi byggisamtykt, men í virðing fyri oman fyrinevndu sjónarmiðum, loyvir undirritaði sær við hesum at spyrja um nakar politiskur vilji er fyri, at tann ætlanin, sum politikararnir áður hava givið úttrykk fyri, verður gjøgnumførd.

Tá so er, vil undirritaði koma til samráðingar hesum viðvíkjandi, men verður samstundis biðið um, at hetta verður gjørt í allar nærmastu framtíð, vísandi til, at umsókn mín um byggiloyvi á nevnda øki nú hevur ligið óvanliga leingi hjá kommununi, hóast byggiumsitingin hevur viðmælt ætlanini.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.